## Umlættingarfamilja

Søkt verður eftir einari umlættingarfamilju til trý systkin í aldrinum 11, 5 og 2 ár, eitt vikuskifti um mánaðin. Børnini eru væl virkandi.

Málið við avlastningsfamiljuni er at styrkja netverkið hjá børnunum og at geva teimum nøkur góð upplivilsir í vikuskiftinum. Tað er ein fyritreyt, at avlastningsfamiljan er sinnað at virka í tøttum samstarvi við biologisku mammuna.

Arbeiði verður skipað í samráð við familjuna og barnaverndarnevndina í Klaksvík.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært galdandi reglum.

Áhugaðar familjur kunnu fáa nærri upplýsingar við at ringja til Tonju Ziskason, tlf. 456388.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 07.05.00 og skulu stílast til

**Barnaverndarnevndina í Klaksvíkar kommunu**
**Postsboks 2 • 700 Klaksvík**

## Landssjúkrahúsið

## 1. assistentur til D7

Á Landssjúkrahúsinum Deild 7 er eitt starv sum 1. assistentur leyst til setan frá 3. mai 2000.

**Høvuðsábyrgdarøki hjá 1. ass. yvirfyri deildarleiðaranum er**

- Medábyrgd av at tilfeingið á deildini verður nýtt ræði bæði viðvíkjandi búskapi og starvsfólkum.
- Avloysa deildarsjúkrasystir.
- Høvuðsábyrgd av lesandi.

**Viðkomandi, sum settur verður, skal hava**

- Sjúkrasystraútbúgving.
- Innlit í røkt av sjúklingum við demens.
- Duga at arbeiða málrættað.
- Hava góð samstarvsevni.

Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til **Marjun Restorff, deildarsjúkrasystir, telefon 313540 lokal 357**.

Umsóknarfreist: 1. mai 2000, kl. 14.00.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum verður at senda til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

*Lýsið í* **sosialinum**

## Pedagogur

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum og stovnum undir tí, við fyribils tænastu í eitt ár á Bústovninum við Garðavegin í Klaksvík er eitt starv sum sáttmálasettur pedagogur leyst til setan 1. mai ella eftir nærri avtalu.

Bústovnurin við Garðavegin er ein verkætlan varandi inntil nýggi bústovnurin í Klaksvík verður tikin í nýtslu væntandi á sumri 2001. Á stovninum búgva 2 autistisk børn fast umframt at stovnurin skal virka sum umlætting fyri aðrar autistar í Norðoyggjum.

Tað er ein fyrimunur hjá umsøkjaranum at hava vitan um autismu og serligu arbeiðshættirnar, sum krevjast til hetta brekið. Ítróttur er ein týdningarmikil partur av arbeiðinum m.a. renning og svimjing, og tí krevst at umsøkjarin er væl fyri kroppsliga.

Arbeiðstíðirnar fevna um morgun-, kvøld- og náttarvaktir.

Starvið er pedagogstarv, sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, men um eingin egnaður pedagogur søkir verður starvið sett við fólki uttan pedagogútbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 456310.

Umsóknarfreistin er 29.05.00 og skulu umsóknir saman vð prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

**Bústovnurin á Garðavegi 38**
FO-700 Klaksvík

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar - FO-188 Hoyvík**
*Telefon +298 312973 - Telefax +298 318624*

Frá 1. aug. 2000 eru 4–6 størv leys sum ársvikarar í hesum lærugreinum:

**alisfrøði, donskum, enskum, føroyskum, ítrótti, religión, støddfrøði, søgu og týskum**

og 3–5 føst størv, treytað av lærugreinasamansetingum, leys at søkja í hesum lærugreinum:

**alisfrøði, heimspeki, lívfrøði, religión, sponskum, sálarfrøði, støddfrøði, teldufrøði og tónleiki.**

Størvini verða sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Undirvísingar- og Mentamálstýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2000.

## ÚTBJÓÐING

Fyri *Sjálvognarstovnin undir Kráarbrekku* í Klaksvík verður byggibúgvingararbeiðið í sambandi við bygging av eldraíbúðum og eldrasambýli hervið boðið út alment.

Arbeiðstøkurnar eru:

1. LENDISARBEIÐI
   - grevstur, spreinging, vegagerð, grovplanering, kloakk- og vatnleiðingsarbeiði, el-arbeiði v.m.
2. FJARHITAARBEIÐI

Útbjóðingartilfarið fæst frá mikudegnum 19. apríl við at gjalda kr. 2.000,- í veð á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi týsdagin tann 18. apríl í ár og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Boð skulu – saman við útbjóðingartilfarinum – latast Fuglø Arkitektum í afturlatnum brævbjálvum merktir

**»Kráarbrekka, byggibúgving«**

í seinasta lagi fríggjadagin 19. mai í ár kl. 15.00.

Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

HØVUÐSRÁÐGEVI
***FUGLØ ARKITEKTAR***
Gerðagøta 12, Postsmoga 1
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97

**SÁMAL JOHANNESEN**
Ráðg. verkfr.
Geilin 22
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 68 37 - Fax 45 68 37

**P/F SOFUS M. JAKOBSEN**
Ráðg. verkfr. F.R.I.
J. H. Schrøters gøta 22, Postsmoga 344
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 35 22 - Fax 31 06 22

**ODDBJØRN VÁGSLÍÐ**
EL-Anlegg
Á Brekku 1,
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 53 74 - Fax 45 78 74

## Landssjúkrahúsið

## Laboratoriið í Runavík

*ER STONGT*
18. apríl og flaggdagin 25. apríl 2000

## Laboratoriið í Tórshavn

*ER STONGT* 17.–18.–19. apríl 2000



# Páskakonsert & dansur



**ARIA**
**FLUX &**
**ARNFRÍÐ**

**í Ítróttarhøllini**
**á Kambsdali**
**Leygarkvøldið 15. apríl**
**kl. 23⁰⁰ - 04⁰⁰**

**Kostnaður 100 kr.**

Miðil 457969

## Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820

**Spf**
***BÓKHALDSFELAGIÐ***
*Óðinshædd 22 - FO-100 Tórshavn*

***Bókhald - Lønarskipan***
***Navigator - Concord***
***við meira...***

***Lønarskipan, ið roknar lønir, limagjøld v.m.***

***Serstakar útskriftir til lánistóvnar, fagfeløg, starvsfólk v.m.***

***Serstakar uppgávur, ið verða nýttar til at gera tilboð eftir.***

*Tel* ***320536*** *Far* ***211969*** *Fax* ***320536***
***www.bokhald.fo • h-hansen@post.olivant.fo***

## Flaggdagsrenning 2000

Meldað verður til luttøku á tlf. 317854 og 319792 til og við leygardegnum 22. apríl.

Luttøkugjald: Børn kr. 20. Vaksin kr. 30.

**www.sosialurin.fo**

**DAGFØR TEG**
**sosialurin**
**HALT**
**SOSIALIN**

**Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar**

**Tíðindablaðið**
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
**Sosialurin rindar postgjaldið**
**64**

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

| |
|---|
| Navn: |
| Búst.: |
| Postnr., bygd, býur: |
| Tlf.: |
| Undirskrift: |

- ☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
- ☐ Internet: 240,-/ársfj.

**sosialurin**